Viðmerkingar:

# Fólkaræðið hjá Høgna Hoydal

Samstundis sum Høgni Hoydal fílist á, at stjórnin ikki vil geva landsstýrinum neyðugt innlit í verjumál, er tað júst tað sama, sum landsstýrið ger mótvegis Føroya fólki.

Í blóðunum hevur Høgni Hoydal grein, hann nevnir *Fólkaræði og verjumál*. Her sigur hann: *"Fólkaræði merkir, at eitt fólk fær innlit í og tekur støðu til allar týdningarmiklar avgerðir í sínum samfelagi"*.

**Føroya fólk fær ikki innlit**

Ein sera týdningarmikil avgerð, Føroya fólk skal taka á eini komandi fólkaatkvøðu, er um fullveldisætlanin skal setast í gildi ella skal sendast har piparið grør.

Og tí skal Føroya fólk hava innlit í hesa ætlan, um avgerðin skal kunna sigast at vera grundað á fólkaræði, sambært Høgnasa egnu tulking av fólkaræði.

Spurningurin er so: Hevur Føroya fólk innlit í fullveldisætlanina? Svarið er eitt greitt nei, tí vit hava bert fingið tað innlit, landsstýrið vil geva okkum, og ikki innlit í tær ógvusligu avleiðingar, ætlanin fer at føra við sær, um hon verður sett í gildi.

**Bert landsstýrisins sjónarmið**

Landstýrið hevur nýtt nógvar tíggjutals mió. skattakrónur til sína einsíðugu fullveldiskunning, meðan andstøðan ikki fær klovið oyra. Og hvat andstøðan megnar at kunna um við ongum pengum, er sera avmarkað.

Sambært løgmann fer andstøðan kanska at fáa nakað av pengum saman við øðrum áhugabólkum (ítróttarfeløgum, sjónleikarafeløgum, Hesuferð, Hinuferð??), tá ið fólkaatkvøðan skal haldast, at kunna um síni sjónarmið. Men tá hevur fullveldisætlanin longu havt eitt forspring uppá 2 — 3 ár.

**Ósamdir óttast repressaliir**

Havi sjálvur roynt at fáa alment løntu serfrøðingarnar, sum hava reist land og ríki runt fyri at kunna um einsíðugu fullveldisætlan landsstýrisins at koma á fund at greiða frá avleiðingum av fullveldisætlanini. Men nei! Teir vilja bert greiða frá landsstýrisins sjónarmiðum. Havi síðan roynt aðrar alment løntar serfrøðingar, sum eg havi vitað hava hjartað á røttum staði, men hesir tora ikki, tí teir óttast repressaliir, um teir fara út og greiða frá negativu avleiðingunum.

Hetta er "fólkaræðið", vit kunnu vænta okkum, um fullveldisætlanin hjá Høgna Hoydal & Co gerst veruleiki.

**Johan Petersen**

# Rættleiðing til Elina

Elin Lindenskov hevur ikki grein í sínum máli, tá hon heldur uppá, at ongin undirtøka er í býráðnum fyri at fáa bíðilistarnar á barnagarðsøkinum burtur sum skjótast. Satt at siga veit eg ongan býráðslim, sum ikki tekur undir við hesum, og royndirnar vísa heldur ikki, at so er.

Orsøkin til, at býráðið á fundinum 5. oktober sendi tilmæli hennara um „100 % barnaansing" aftur í nevnd, var stutt og greitt, at býráðslimir ikki vildu binda seg til nakað, sum teir møguliga ikki kunnu halda, fyrrenn teir fingu eitt betri grundarlag at taka støðu út frá.

Tildømis fylgdu hvørki framrokningar av barnatalinum ella nakrar kostnaðarmetingar við tilmælinum.

Elin sigur, at málið er koyrt aftur í nevnd, har tað nú kann liggja til eftir valið, men tað var ongantíð ætlanin hjá býráðnum.

Tvørturímóti varð hetta gjørt fyri at fáa sosialu nevnd at útvega eitt so haldgott grundarlag sum gjørligt at taka støðu út frá.

Hetta er sera umráðandi at fáa greiði á, nú farið verður undir viðgerðina av uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2001, sum ætlanin er at avgreiða við aðru og endaligu viðgerð tann 8. november.

Vinarliga

**Leivur Hansen, borgarstjóri**

# Býráðsval – Tórshavnar kommuna

Tá eg stilli upp til hetta valið, er tað við nakað av sorgblíðni.

Eg havisitið í Kollafjarðar bygdarráð seinastu fýra árini. Tá hetta valskeiðið er runnið, siga vit farvæl til heitið og stovnin Kollafjarðar Bygdarráð, nú skulu vit venja okkum at siga Býráðið, tá vit tosa um kommunal viðurskiftir. Soleiðis broytist.

Nú skulu vit hyggja frameftir við treysti og vón. Vón um eitt tíðaskeið við framburði. Eitt tíðarskeið við betraðum umstøðum hjá teimum sum mangla pláss til barnaansing. Eitt tíðarskeið har hølisviðurskiftini í skúlanum gerast betri. Har vegurin til og úr skúla gerast tryggari. Har trivnaðurin økist.

Millum onnur eru hetta mál vit kunnu og skulu arbeiða fyri, bæði á Argjum, í Havn, í Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði – í nýggju Tórshavnar kommunu.

Tí sigi eg ja til at vera valevni til býráðsvali 2000.

**Terje Davidsen valevni á listanum hjá Sambandsflokkinum til býráðsvalið 2000**

# Tillukku Hoyvíkingar!

Ungdómurin í Hoyvík við H71 á odda hevur umsíðir fingið játtað ítróttarhøll. Hóskvøldið í síðstu viku samtykti býráðið ætlanina við bert einari atkvøðu ímóti. Tilboðini uppá byggingina skulu verða inni innan 17. november 2000 og verður høllin ætlandi klár summarið 2001.

Fólkagrundarlagið í Hoyvík er stórt og veksur skjótt og kemur høllin tí sera væl við. Serliga eru tað yngru deildirnar hjá bæði gentum og dreingjum, sum fáa betur umstøður.

H71 hevur ongantíð fingið somu rættindi til høllina á Hálsi og høllina í Gundadali, sum hini havnarfeløgini. Heilt frá byrjan hava høliviðurskiftini hjá H71 verði sera trong. Hjá fleiri av ungu og evnaríku spælarunum hava umstøðurnar ført til, at teir eru farnir úr hoyvíksfelagnum til hini havnarfeløgini. Høliviðurskiftini hava verið ein beinleiðis forðing fyri menning felagsins.

Hóast 1. manslið í hondbólti altíð hevur verið raðfest høgt í H71, hava teir ikki havt somu venjingarumstøður, sum hini feløgini teir kappast ímóti. Við nýggju høllini fær H71 møguleika at víðka virksemi til aðrar ítróttargreinar enn hondbólt. Borðtennis og badminton hava fyrr verði ítróttargreinar har H71 hevur staði seg væl í kappingini.

Tí veður einki at ivast í, at hoyvíkingar, við nýggju høllini, fara at gera seg enn meiri galdandi á føroyska ítróttipallinum í framtíðini

Høllin verður karmur um virksemi av øllum slag. Ein høll til hoyvíkingar, vestanfyri skúlan, fer at eggja til ítriv og virkni hjá okkara skúlabørnum og skapa eitt umhvørvi, sum, fyri ein part, kemur at virka sum eitt slag av "frítíðarskúla" aftaná skúlatíð.

**Anna Dahl-Olsen Valevni til Tórshavnar býráð**

# Íbúðir til eldri og ung

Endiliga verður skjøtul settur á. Saman við Húsalánsgrunninum fer kommunan undir at byggja íbúðir í Berjabrekku. Væntandi standa 20 íbúðir lidnar longu komandi ár. Tey bæði fylgjandi árini er ætlanin at byggja eitt tilsvarandi tal á hvørjum ári. Gongst sum ætlað kunnu sostatt 60 íbúðir bjóðast út komandi trý ár til eldri medborgarar og annars fólk við serligum tørvi.

Ofta hevur verið havt á lofti, at tað verða bara tey ríku gomlu, ið fáa ráð at verða við. Her er tó ætlanin, at ognarviðurskiftini verða sum í einum lutafelag. Rætt er, at eitt innskot skal gjaldast, kanska 100.000 kr., men so verður eisini talan um eina rímuliga húsaleigu. Vilt tú og fært tú goldið størri innskot, verður húsaleigan samsvarandi minni. Annars verður tað stórt sæð, sum um tú átti bústaðin sjálvur. Tó er ein avgerandi munur, tú hevur ikki rætt at selja íbúðina víðari. Hon fer aftur til felagsskapin, og innskotið verður afturgoldið. Hetta er eisini galdandi, tá ið eigarin fellur frá. Íbúðin kann ikki arvast. Tað sigur seg sjálvt, at hetta má vera galdandi, annars er hugskotið við eldraíbúðum av hesum slag burtur.

Vit kunnu ikki bíða longur. Tí má hendan ætlan undir ongum umstøðum steðga.

Samstundis verður arbeitt við at skapa alternativar bústaðir á meira privatum grundarlagi, eisini í Berjabrekku. Hetta fær eisini mín fulla stuðul. Vit treingja harðliga til minni íbúðir í Havn. Nógv eldri hvørki orka ella hava ráð at halda síni gomlu sethús. Støðan hjá teimum ungu er í so máta øðrvísi. Tey hava heilt einfalt ikki ráð at ogna sær hús, ístaðin mugu tey leiga dýrt. Eisini einlig ella "singles" við ella uttan børn høvdu á hendan hátt fingið ein møguleika.

Hesar íbúðir verða til ognar, og tær høvdu sostatt gjørst ein partur av vanliga húsamarknaðinum. Sum er, er markanaðurin sera óliðiligur. Vórðu minni íbúðir bygdar, kundu tey ungu farið undir íløguna fyri lívið á ein lættari hátt. Hetta við fyrst at ogna sær eina íbúð og búð har nøkur ár, til umstøðurnar kanska gjørdust ov trongar, men tá hevði peningur verið til sethúsabygging ella —keyp, hetta við at selja íbúðina. Eisini tey eldru høvdu fingið tað lættari. Tey kundu nú uttan at órógvast sloppið sær av við síni tungu sethús, tí tað bar til hjá teimum at ogna sær eina íbúð uttan at gerast óbótafør.

Sigast má tó, at tað er sera týdningarmikið, at hendan alternativa byggingin ikki gerst ov dýr.

Men sum tað sæst, so hevur kommunan ætlanir — ítøkiligar ætlanir — sum vónandi longu komandi ár hava til úrslit, at íbúðir bæði av fyrra og seinna slagnum verða at síggja í Berjabrekku.

**Klæmint Olsen býráðslimur**

**Listin til býraðsvalið í Klaksvík 2000 Javnaðarflokkurin í Norðoyggjum**

Karl Jákup Ósá Eliasen, Heðin Heldarskarð, Leif W. Høgnesen, Hanna Jacobsen, John Sigurd Joensen, Ernie Johannessen, Edvin Kjærbo, Noomi Nielsen,Eyðgunn Samuelsen, og Torleif Sigurðsson.
Øll úr Klaksvík.



# HYGG & HOYR

Fríggjadagur 13. oktober

# Vágadal »in action«

Sunnukvøldið kl. 20 fer Sjónvarp Føroya at senda Atlantic Giant kappingina, sum var í summar. Øll kappingin verður send í tveimum sendingum. Tann seinna verður mikukvøldið kl. 20. Her verður møguleiki at síggja Regin Vágadal, Føroya sterkasta mann, in action.

Regin Vágadal er tann ítróttarmaðurin í Føroyum, sum hevur staðið seg best millum heimsins bestu í hansara ítróttargrein. Hann hevur tvær ferðir verið í finaluni um at gerast heimsins sterkasti, men eydnan hevur ikki verið við honum. Í ár var hann í finaluni, men endaði á áttanda plássi, tí hann var illa darvaður av skaða í økslini. Enn er Regin tó ungur í hesum høpi.

Síðani Regin gjørdi av at fara við í altjóða kappingar, hevur hann vant miðvíst, so at hann nú telist millum teir sterkastu í heiminum. Tað byrjaði við, at hann fór at venja úti við Strond, har Fragd og Fimi nú er. Síðani hevur hetta fingið størri pláss í lívi hansara, og nú er hetta fyri tað mesta hansara yrki, og tað má sigast, at hann hevur verið ein góður umboðsmaður fyri Føroyar.

Eftir hesa kappingina legði Regin leiðina út aftur í heimin at kappast, og hann ferðast kring allan heimin fyri at luttaka í kappingum.

Hetta er triðja árið, at skipað verður fyri Atlantic Giant í Føroyum, og tað hevur gingist betur hjá Regin fyri hvørja ferð, hann hevur verið við. Fyrstu ferð var hann á sætta plássi, meðan hann var nummar tvey í fjør. Áður hava kappingarnar ikki verið so væl skipaðar, men fyrireikararnir hava fingið tær neyðugu royndirnar við at hava slíkar kappingar, og nú eru tær sera væl úr hondum greiddar. Sjónvarpið hevur eisini verið til staðar hvørja ferð, og kappingarnar eru sendar aftaná.

Regin vildi sera fegin vinna hesa kappingina, tí hann kappaðist frammanfyri sínum egnu áskoðarum, og hann var á heimavølli.

Hann hevði tí nakað at vísa sínum egnu í hesi kappingini. Hann skuldi kappast móti nøkrum av teimum sterkastu í heiminum. Heimsins sterkasti maður, Janne Virtonen, var eisini við.

Kappingin var í ymsum støðum í Havnini og veðrið var av tí fagrasta. Byrjað varð uppi við Hotel Føroyar, har ein kapping var, og so vóru tríggjar í miðbýnum. Seinastu fimm kappingarnar vóru úti á Skansanum, har nógv fólk varð komið saman at stuðla Regini.

Regin var væl við allatíðina, og eftir fyrstu kappingina var hann á øðrum plássi. Hann var tó óheppin í lutakastinum, tí hann skuldi royna seg fyrst, og tað dámar teimum lítið. Tað er best at kunna samanbera seg við hinar kappingarneytarnar.

Regin helt seg hava góðar møguleikar at fáa eitt gott úrslit, um skaðin ikki fór at gera um seg aftur, sum hann upplivdi í kappingini um at gerast heimsins sterkasti.

Átta menn royndu sína styrki í Atlantic Giant 2000, og umframt Regin Vágadal vóru Torfi Ólafsson úr Íslandi, Magnus Samuelson úr Svøríki, Hubert Dorer úr Eysturríki, Janne Virtonen úr Finnlandi, Laszlo Fekete úr Ungarn, Rene Minkwitz úr Danmark og Rob Dikson úr Bretlandi.

Regin Vágadal í Sjónvarpi Føroya sunnukvøldið kl. 20.

# Vit støkka inn á gólvið

Jógvan Arge hittir í hesi sendingini Jóhan Norðfoss í Havn, sum hevur upplivað mangt og hvat, ið hann greiðir nærri frá í sendingini.

Hann fór í 1939 við jarnsluppini Turid, sum partafelagið Nabb hjá Zacharias Heinesen átti. Størsti parturin av manningini vóru sandoyingar. Við Turid fiskaði Jóhan Norðfoss bæði undir Íslandi og í Grønlandi.

Um veturin var Jóhan saman við øðrum vaktarmaður hjá fýra týskum flúgvarum, sum vóru interneraðir úti á Hospitalinum. Í 1940 fór hann at snurra við einum esbjergara, sum var í útisetu. Lønin var so góð, at tað var næstan sum fyri kríggið.

Til ber at hoyra Jóhan Norðfoss greiða frá lívi sínum sunnudagin kl. 14.15. Hetta er onnur sending.

# Rás 2 brynjar seg út til valið

Rás 2 byrjaði sum ein útvarpsrás, ið bara kundi hoyrast í miðstaðarøkinum. Síðani var ein sendari settur upp í Norðoyggjum í samstarvi við Norðoya Sparikassa. Nú verður aftur stig tikið til at víðka sendinetið, og um stutta tíð fer Rás 2 at hoyrast um størsta partin av landinum.

Arbeiðið við at seta ein sendara upp á Sornfelli er farið í gongd, og tá tað er liðugt, verður ein sendari settur upp á Hestinum í Suðuroy. Tá hesir sendarar eru settir upp, kunnu fólk kring landið leita eftir Rás 2. Enn er ikki greitt um allar bygdir fara at hoyra Rás 2, eftir at sendararnir eru settir upp. Rás 2 fer at hava nakrar royndarsendingar, og tá ber til at siga um aðrir smærri millumsendarar skulu setast upp.

Nú kommunuvalið stundar til, og politikarar veruliga eru úti um seg, fer Rás 2 at hava sendingar, sum snúgva seg um valið. Loyvið er komið uppá pláss, og Rás 2 fer at borðreiða við politikki uppundir kommunuvalið. Býráðspolitikarar fara at vera í útvarpsstovuni og hava framløgur ella kjakast við aðrar politikarar. Enn er skráin ikki endaliga løgd, men tað verður greitt í næstu viku.

ÚTsjón verður aftur í næstu viku